*Versionsdato: 3. november 2025*

**LEIÐREGLURNAR FYRI SJÓMAQ-PENINGANØGDINA UMSETTAR TIL FØROYSKT.**
Við tulkingar- og ivamál, er danska útgávan av leiðreglunum tann galdandi. Hetta kemur av at avgreiðslustovan, ið viðger umsóknirnar ikke skilir føroyskt.

# Leiðreglur fyri Sjómaq-peninganøgdina

**§ 1 Endamál**

1) Peninganøgdin skal skapa nýggj bond og styrkja verandi bond millum ung í ríkisfelagsskapinum.
2) Peninganøgdin skal økja sínamillum vitanina millum ung tvørtur um landamørkini í ríkisfelagsskapinum – undir hesum mentan, søgu, mál og nútíðarsamfelagið í teimum trimum londunum.

**§ 2 Hvør kann søkja úr peninganøgdini?**

1) Øll ungmannaføløg og sjálvskipaðir bólkar av ungum, ið hava heimstað í Grønlandi, Føroyum og Danmark, kunnu søkja burtur úr peninganøgdini.
2) Ung skulu stýra virkseminum. Ung skulu hava ábyrgd av menningini og at útinna virksemið. Vaksin kunnu spæla ein leiklut við at seta í gongd, lætta um og vegleiða, men tað eru ung, sum skulu hava endaliga avgerðarrættin. I hesum sambandi er ein ung/ur, um ein er undir 30 ár.
3) Virksemið skal vera grundað á sjálvboðið arbeiði. Sjálvboðin skulu vera við til at taka avgerðir, ráðleggja og fremja virksemið, og tær berandi kreftirnar í verkætlanini skulu vera óløntar.
4) Í niðan fyri nevndu førum ber ikki til at fáa stuðul:
    a. um endamálið við virkseminum er handilsligur rakstur, ella um virksemið tænir handilsligum áhugamálum.
    b. um verkætlanin er við til at stuðla vinnugreiniligum ella yrkisligum áhugamálum.
    c. um sjálvskipaði bólkurin av ungum/ungmannafelagið ella teirra limir luttaka í, ella um bólkurin av ungum/ungmannafelagið ikki tekur frástøðu frá, ólógligum virksemi ella virksemi, sum verður mett at vera í ósamsvari við vanligu rættarfatanina við at vera í stríð við lógina, ella á annan hátt er grundað á ódemokratiskar mannagongdir.

**§ 3 Hvør hevur ábyrgdina av verkætlanini/virkseminum?**

1. Er umsøkjari ein felagsskapur, hevur felagsskapurin við nevndini ábyrgdina av virkseminum. Tí er umráðandi, at kontaktpersónurin, sum umboðar felagsskapin mótvegis DUF, hevur heimild/fulltrú frá sínum felagsskapi/heimafelag til at søkja burtur úr peninganøgdini. Kontaktpersónurin, sum umboðar felagsskapin mótvegis DUF, umboðar felagsskapin í øllum viðurskiftum í sambandi við umsóknina og bindir tí felagsskapin í mun til verkætlanina/virksemið. Nevndin í felagsskapinum kann skrivliga boða

DUF frá, um annar persónur skal vera kontaktpersónur, og í slíkum føri skal nevndin alt fyri eitt boða frá, hvør nýggi kontaktpersónurin er.

2. Um kontaktpersónurin umboðar sjálvskipaðan bólk av ungum, heftir viðkomandi beinleiðis og óavmarkað mótvegis DUF í øllum viðurskiftum, sum viðvíkja verkætlanini/virkseminum. Hetta er eisini galdandi, um samstarvið í sjálvskipaða bólkinum heldur uppat. DUF hevur ikki skyldu til at góðtaka ein nýggjan kontaktpersón.
3. Kontaktpersónurin í sjálvskipaðum bólkum av ungum skal vera myndigur.

**§ 4 Tillutanarkrøv**

1) Pengarnir skulu býtast breitt út í øllum ríkisfelagsskapinum. Hetta merkir, at peninganøgdin raðfestir umsóknir frá londum, sum í minni mun hava fingið stuðul fram um onnur lond, og eisini umsóknir, har fleiri ung og/ella lond luttaka fram um færri.
2) Pengarnir skulu spjaðast út millum ymiskt virksemi. Hetta merkir, at peninganøgdin raðfestir virksemi, sum hevur fingið minni stuðul enn annað virksemi.
3) Pengarnir skulu býtast breitt út millum ymisk ungmannafeløg/bólkar av ungum. Hetta merkir, at peninganøgdin raðfestir umsóknir við fleiri ymiskum sløgum av ungmannafeløgum/bólkum av ungum, sum samstarva um virksemið.
4) Pengarnir skulu vera íkast til øktan kunnleika millum ung í ríkisfelagsskapinum sbrt. § 1, nr. 2, og verkætlanin skal grundast á einum samstarvi millum partarnar. Hetta merkir, at peninganøgdin raðfestir umsóknir, sum vera mettar at hava við sær áhaldandi rótfesti og javnbjóðis samstarv millum luttakandi partarnar.
5) Sbrt. § 4 í tillutanarkrøvunum kan peninganøgdin sýta umsóknini ella játta eina minni upphædd enn upprunaliga søkt um við atliti at støddini av peninganøgdini.

**§ 5 Hvat kann stuðul søkjast til?**

1) Virksemi og verkætlanir eins og tilfar og hjálparamboð, sum styrkja møguleikan hjá ungum í Føroyum, Grønlandi og Danmark at hittast tvørtur um landamørkini, og har ung frá minst tveimum av nevndu londum luttaka.
2) Til ber at søkja stuðul til allar rímiligar og neyðugar útreiðslur í sambandi við ferðir, uppihald, virksemi, verkætlanir og líknandi, sum eru í samsvari við endamálið.
3) Til ber at søkja um upp í 10.000 kr. til granskoðan, tá søkt verður um meira enn 100.000 kr.
4) Stuðul verður ikki givin til:
   a. Húsaleigu, haldaragjald ella aðrar fastar útreiðslur.
   b. Skeiðs- / luttøkugjald.
   c. Løn ella til at keypa sjálvboðin leys.
   d. Bygging ella umvæling av bygningum eins og varandi útveganarkostnað.
   e. Virksemi uttan greitt rótfesti í antin Grønlandi, Føroyum ella Danmark
   f. Politiskt valstríð fyri einstaklingar.

   g. Virksemi, sum í roynd og veru líkist gudsdyrkan.
   h. Virksemi/verkætlanir, sum eru byrjað ella hildin, áðrenn umsóknarfreistin er farin.
   i. Virksemi, sum fyrst og fremst hevur sosial eyðkennir.
5) Um møguligt inntøkugevandi virksemi hevur tilknýti til virksemi ella verkætlan, sum hevur fingið stuðul, verður yvirskotið mótroknað í veitingini.

**§ 6 Hvussu nógv kann søkjast?**

1) Til ber at søkja millum 10.000-250.000 DKK pr. umsókn.

**§ 7 Hvussu verður søkt?**

1) Umsókn til peninganøgdina kan einans sendast talgilt ígjøgnum umsóknarportali á heimasíðuni hjá peninganøgdini. Avgreiðslustovan hjá peninganøgdini kan gera undantak frá hesum, um talan er um tekniskar trupulleikar ella tílíkt.
2) Umsóknir verða viðgjørdar, tá ið umsóknarfreistin er farin. Umsóknarfreistir verða almannakunngjørdar á heimasíðuni hjá peninganøgdini.
3) Um umsóknin skal viðgerast, skal hon innihalda hesar upplýsingar:
   a. Persónsupplýsingar hjá kontaktpersóni/persóni við ábyrgd av verkætlanini umframt hjá einum kontaktpersóni fyri hvørt landið, sum luttekur í verkætlanini
   b. Vinnutal hjá felagnum ella persónstal hjá tí, sum hevur løgfrøðiliga ábyrgd (v-tal ella p-tal)
   c. Umsóknarblað, sum er fylt út og skrivað á donskum
   d. Byrjanar- og endadagfesting
   e. Fíggjarætlan
   f. Bankaupplýsningar (registrerings- og kontonummar um sjálvskipaðir bólkar av ungum og felagsskapir vinnutal)

**§ 8 Viðgerð av umsókn og játtan**

1) Avgreiðslustovan hjá peninganøgdini kann í sambandi við málsviðgerðina biðja um fleiri upplýsingar fyri at viðgera umsóknina.
2) Umsóknirnar verða viðgjørdar á fundi í játtanarnevndini, tá ið umsóknarfreistin er farin.
3) Umsóknin kann eftir viðgerð antin verða játtað, partvís verða játtað ella verða sýtt. Umsøkjari fær svar beinanvegin, aftaná nevndin hevur viðgjørt umsóknina.
4) Til ber at flyta upp í 10% millum góðkendar útreiðslur, eftir at játtanin er givin. Allar broytingar skulu leggjast fram og góðkennast av avgreiðslustovuni, áðrenn broytingar kunnu koma í gildi. Til ber at minka játtanina, um broytingarnar ikki eru góðkendar.
5) Allar broytingar í verkætlanar-/virksemisinnihaldinum og/ella tíðarætlanini, sum fara fram, eftir at játtan er givin, skulu góðkennast av avgreiðslustovuni. Til ber at minka um játtanina, um broytingar ikki kunnu góðkennast.

**§ 9 Útgjald af peningi**

1) Útgjald av stuðli fer fram í tveimum. Eitt 1. útgjald, sum svarar til 80% af játtanini, og eitt 2. útgjald, sum svarar til tey írestandi 20% av játtanini. Til ber at biðja um stuðul, tá játtanarbræv er móttikið.
   a. Fyrra útgjald á 80% fæst við at senda umbøn til avgreiðslustovuna í sama umsóknarportali sum umsókning verður send umvegis. Kontaktpersónurin skal vera fyltur 18 ár. Til ber at lesa um ábyrgdina hjá kontaktpersóninum í § 3.
   b. Seinnu 20 % af játtaða stuðlinum kunnu gjaldast út, tá ið avgreiðslustovan hjá peninganøgdini hevur fingið í hendi og hevur góðkent roknskapin og endaligu frágreiðingina um virk-semið/verkætlanina. Les meira um hetta í § 10.
   c. Skal peningurin gjaldast út til eina konta, sum ikki er knýtt at einari danskari NemKonta, skal ein bankaváttan, ið játtar ognarrættin til kontuna, sendast við fyrsta útgjald.
2) Stuðulin kann krevjast heilt ella partvís afturgoldin, um:
   a. Virksemið ikki er fullført, eins og lýst í umsókníni, ella um verkætlanin ikki lýkur krøvini, sum eru ávíst í leiðreglunum hjá Sjómaq-peninganøgdini.
   b. Virksemið endar við yvirskoti.
   c. Roknskapur ella endalig frágreiðing um fullførda virksemið ikki kann góðkennast.
   d. Omanfyri nevndu møguleikar fyri at krevja afturgjald eru ikki úttømandi.

**§ 10 Hvussu verður endaliga greitt frá?**

1) Stuðulsmóttakarar, ið fáa játtað upphæddir á minni enn 100.000 kr., skulu:
   a. útfylla eitt endaligt frágreiðingaroyðublað í umsóknarportalinum.
   b. útfylla ein roknskap.
   c. vátta, hvussu stórur partur av játtanini er brúktur, og at stuðulin er brúktur í samsvari við játtanina og leiðreglurnar.
2) Stuðulsmóttakarar, ið fáa játtað upphæddir yvir 100.000 kr., skulu:
   a. útfylla eitt endaligt frágreiðingaroyðublað í umsóknarportalinum.
   b. útfylla ein roknskap.
   c. vátta hvussu stórur partur av játtanini er brúktur, og at stuðulin er brúktur í samsvari við játtanina og leiðreglurnar.
   d. senda inn grannskoðanarváttan, sum er undirskrivað av einum skrásettum ella einum ríkisgóðkendum granskoðara. Í sambandi við umsóknir yvir 100.000 kr. ber til at søkja um pening til grannskoðara.
3) Um annað ikki er avtalað, skal endalig frágreiðing latast avgreiðslustovuni hjá peninganøgdini í seinasta lagi ein mánað, aftaná verkætlanin/virksemið er endað í samsvari við játtanarskeiðið.

4) Ein og hvør stuðulsmóttakari skal goyma roknskapartilfar – m.a. kvittanir, fakturar ella tílíkt – í 5 ár frá ársloki av kalendaraárinum, tá játtaða virksemið/verkætlanin endaði. Stuðulsmóttakari skal eftir kravi senda tilfarið til avgreiðslustovuna hjá peninganøgdini.
5) Stakroyndir verða leypandi tiknar av útgoldnum peningi, har tað eftir ítøkiliga meting og umrøðu kann verða kravt roknskaparskjal fyri goldnar útreiðslur.
6) Um kravið um endaliga frágreiðing ella luttøku í stakroyndum ikki verður hildið, kann hetta hava við sær fult ella partvíst afturgjald av stuðlinum.

**§ 11 PR og umrøða**

1) Dansk Ungdoms Fællesråd og danska mentamálaráðið kunnu brúka upplýsingar um virksemi/verkætlanir til at umrøða peninganøgdina og verkætlanina, og tað verður væntað av umsøkjarum, at teir í rímiligan mun taka lut í hesum.
2) Avgreiðslustovan hjá peninganøgdini hevur ábyrgd av at almannakunngera peninganøgdina og umsóknarfreistir.

**§ 12 Fyrisitingin hjá peninganøgdini.**

1) Dansk Ungdoms Fællesråd umsitur peninganøgdina sambært avtalu við danska mentamálaráðið.
2) Peninganøgdin hevur heimstað í Danmark, fylgir danskari lóggávu og allar upphæddir eru í donskum krónum (DKK).